UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **21. juni 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-8**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-163/2020 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, til Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, eftir § 52a í Tingskipanini, um næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Metir landsstýrismaðurin, at næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum er ov høgt?
2. Um ja, eru nakrar ætlanir at minka um næmingatalið í flokkunum og nær?
3. Um nei, eru aðrar broytingar á fólkaskúlaøkinum á veg? Um ja, hvørjar?

Svar

Til 1: Næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum er rættiliga ymiskt í skúlunum kring landið. Hetta er í stóran mun tengt at búsetingarmynstrinum og eisini, um skúli hevur eina skipan við samanløgdum flokkum. Sostatt skiftir næmingatalið frá einum næmingi í tveimum fólkaskúlum til 53 næmingar í skúla við samanløgdum flokkum.

Í § 20 í fólkaskúlalógini er ásett, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 næmingar. Miðað verður ímóti at halda seg til hesa meginreglu. Í játtanarskipanini til fólkaskúlan verður fult tímatal játtað til tveir flokkar, tá ið næmingatalið er 27 næmingar, tó verða eyka tímar játtaðir, tá ið næmingatalið í einum flokki í 3. – 7. flokki er 25 ella 26 næmingar.

Í verandi skúlaári eru tað 159 flokkar, sum hava 20 næmingar ella fleiri, og er býtið millum hesar flokkar, at tað eru :
87 flokkar, sum hava 20 – 23 næmingar og
72 flokkar, sum hava 24 – næmingar ella fleiri

Tað kann verða torført at røkka einstaka næminginum, tá ið næmingatalið er høgt í einum flokki. Vit hava skyldu til at taka atlit at tí einstaka, so at allir næmingar bæði læra og trívast í fólkaskúlanum. Eg fari at eftirmeta skipanina eisini við atlit at, at næmigatalið er rættiliga høgt í nógvum flokkum, serliga í skúlum, har stór næmingatilgongd er.

Til 2: Eg fari at eftirkanna skipanina bæði lógarásetingar og játtanarmannagongd. Áðrenn hetta er gjørt, er valla rætt einvíst at svara ja ella nei. Trivnaður og læring veldst eisini um samansetingina í flokkinum, førleikarnar hjá tí einstaka næminginum, og um játtaðir eru eyka tímar til næmingar við serligum avbjóðingum, ella talan er um byrjanarundirvísing, har partvís tvílæraraskipan verður sett í verk, tá ið næmingatalið er 19 næmingar og fleiri.

Til 3: Samgongan hevur m.a. sett sær fyri, at tillagingar og dygdargóðar broytingar verða gjørdar í fólkaskúlalógini í sambandi við m. a. floksstødd.

Eg havi sett sjøtul á hetta arbeiðið, har floksstødd verður eitt evni. Harumframt verður dentur lagdur á at dagføra tíma- og lærugreinabýtið og viðurskifti, sum eru tengd at hesum sum kravdar lærugreinir, vallærugreinir, býtið millum tær hugvísindaligu og náttúruvísindaligu lærugreinarnar, og um tær handaligu og skapandi lærugreinarnar hava nóg stóra rúmd í fólkaskúlanum. Flokslæraraarbeiðið verður eisini raðfest sum partur av trivnaðararbeiðinum og læringini í einstaka flokkinum, og sum partur av samskiftinum millum heim og skúla og samskipanini í læraratoymunum.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður